**Løgmansskrivstovan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 04.10.2021 |
| Mál nr.: | 21/19947 |
| Málsviðgjørt: | NF |

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1** |
| | Í løgtingslóg nr. 51 frá 3. mai 1994 um ættleiðingarstuðul, sum broytt við løgtingslóg nr. 125 frá 22. desember 2000, løgtingslóg nr. 123 frá 22. desember 2008, løgtingslóg nr. 105 frá 11. november 2010 og løgtingslóg nr. 42 frá 6. mai 2014, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 6.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í Almanna- og heilsumálum. | **1.** § 6 verður orðað soleiðis:<br>"**§ 6.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **2.** Danski tvíteksturin verður strikaður. |

| | |
|---|---|
| | **§ 2**<br><br>Í løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 21. apríl 1999, løgtingslóg nr. 6 frá 25. januar 2001, løgtingslóg nr. 38 frá 21.mai 2008, løgtingslóg nr. 16 frá 2. mars 2011 og løgtingslóg nr. 104 frá 3. november 2016, verður § 20 orðað soleiðis: |
| **§ 20.** Avgerðir Almannaverksins sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. | "**§ 20.** Avgerðir Almannaverksins sambært hesi løgtngslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 5.** Almannaverkið hevur fyrisitingina av viðbótini um hendi.<br>*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar av Almannaverkinum, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum. | **§ 3**<br><br>Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensiónistar v.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 13. mars 2000, løgtingslóg nr. 58 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010, løgtingslóg nr. 65 frá 15. mai 2012, løgtingslóg nr. 135 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 48 frá 6. mai 2016, løgtingslóg nr. 115 frá 24. november 2015, løgtingslóg nr. 68 frá 30. apríl 2018 og løgtingslóg nr. 189 frá 21. desember 2018, verður § 5, stk. 2 orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar av Almannaverkinum, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 4**<br><br>Í løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspenng, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 2. mai 2001, løgtingslóg nr. 78 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr 136 frá 28. desember 2010, verður § 6 orðað soleiðis: |

| | |
|---|---|
| **§ 6.** Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu kærast til landsstýrismannin.<br>*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br>*Stk. 4.* [4)] Landsstýrismaðurin kann áseta, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 kann leggjast til eina kærunevnd | "**§ 6.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 39.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.<br>*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | **§ 5**<br><br>Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 12. desember 2020, verður § 39 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 39.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 25.** Avgerðir eftir hesi lóg, sum eru tiknar av Almannaverkinum ella øðrum myndugleika sambært § 22, stk. 2, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.<br>*Stk. 2.* Um serligar orsøkir tala fyri tí, kann kærunevndin víkja frá kærufreistini. | **§ 6**<br><br>Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 143 frá 9. oktober 2020, verður § 25 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 25.** Avgerðir sambært hesi løgtingslóg, sum eru tiknar av Almannaverkinum ella øðrum myndugleika sambært § 22, stk. 2, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| *Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum*<br><br>**§ 65.** Tær avgerðir, ið §§ 64 og 64 a ikki fevna um, men sum eru tiknar av myndugleikum sambært hesi løgtingslóg, kunnu innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. Kærunevndin kann víkja frá hesi freist, um serlig orsøk er til tað.<br>*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar av myndugleikum sambært hesi lóg, verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri Kærunevndina.<br>*Stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum, kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika og verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri rættin. | **§ 7**<br><br>Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Yvirskriftin yvir § 65 verður orðað soleiðis: “*Føroya Kærustovnur*”<br><br>**2.** § 65 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 65.** Tær avgerðir, ið §§ 64 og 64 a ikki fevna um, men sum eru tiknar av myndugleikum sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar av myndugleikum sambært hesi løgtingslóg, verða ikki freistaðar, um tær verða lagdar fyri Føroya Kærustovn.” |
| **§ 36.** Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu innan 4 vikur eftir, at kærari hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | **§ 8**<br><br>Í løgtingslóg nr. 63 frá 15. mai 2012 um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum broytt við løgtingslóg 142 frá 20. desember 2012, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2013, løgtingslóg nr. 70 frá 22. mai 2015, løgtingslóg nr. 138 frá 16. desember 2015, løgtingslóg nr. 132 frá 20. desember 2016, løgtingslóg nr. 76 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 103 frá 13. juli 2017, løgtingslóg nr. 152 frá 12. desember 2018 og løgtingslóg nr. 187 frá 18. desember 2020, verður § 36 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 36.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.” |

| | |
|---|---|
| | **§ 9**<br><br>Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 121 frá 15. desember 2014, løgtingslóg nr. 62 frá 9. mai 2019 og løgtingslóg nr. 70 frá 25. mai 2020, verður § 20 orðað soleiðis: |
| **§ 20.** Avgerðir um tænastur sambært hesi lóg kunnu kærast til kærunevndina í Almanna-, familju- og heilsumálum.<br>*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið skrivliga fráboðan um avgerðina. | "**§ 20.** Avgerðir um tænastur sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 10**<br><br>Í løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum broytt við løgtingslóg nr. 167 frá 20. desember 2017, løgtingslóg nr. 187 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 65 frá 9. mai 2019 og løgtingslóg nr. 18 frá 10. mars 2020, verður § 14, stk. 2 orðað soleiðis: |
| **§ 14.** Almannaverkið hevur fyrisitingina av familjuískoytinum um hendi.<br>*Stk. 2.* Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu innan 4 vikur kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | "*Stk. 2.* Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 11**<br><br>Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, verður § 71 orðað soleiðis: |
| **§ 71.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Kærunevndin kann víkja frá hesi freist, um heilt serlig orsøk er til tað. | "**§ 71.** Avgerðir hjá Almannaverkinum sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| | **§ 12**<br><br>Í lov nr. 56 af 18. marts 1925 om Ægteskabets Retsvirkninger, sum broytt við lov nr. 284 frá 11. november 1931, lov nr. 136 af 7. mai 1937, § 54 í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962, anordning nr. 469 af 24. september 1984, § 4 anordning nr. 398 af 20. april 2010, anordning nr. 724 af 12. juni 2017, § 1 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 og § 13 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 52 orðað soleiðis: |
| **§ 52.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | "**§ 52.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 13**<br><br>Í lov nr. 102 af 14. marts 1941 om Bevarelse af enkepensionsret ved Separation og Skilsmisse, sum broytt við lov nr. 268 af 14. juni 1951 og § 2 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verður § 3 a orðað soleiðis: |
| **§ 3 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | "**§ 3 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 14**<br><br>Í lov nr. 397 af 12. juli 1946 om borteblevne, sum sett í gildi við lov nr. 335 af 19. november 1954, broytt við § 9 í anordning nr. 398 af 20. apríl 2010 og § 3 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verður § 27 a orðað soleiðis: |
| **§ 27 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | "**§ 27 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 21 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til kærunevndina í almanna- og heilsumálum. | **§ 15**<br><br>Í lov nr. 200 af 18. mai 1960 om børns retsstilling, sum sett í gildi við anordning nr. 367 af 29. november 1962, sum broytt við anordning nr. 13 af 18. januar 1982, lov nr. 92 af 23. februar 1988, § 6 í anordning nr. 398 af 20. april 2010, § 5 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, løgtingslóg nr. 33 frá 12. mars 2020 og § 36 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 21 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 21 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 71 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | **§ 16**<br><br>Í lov nr. 215 af 31. mai 1963 om Arvelov, sum sett í gildi við anordning nr. 272 af 14. mai 1986, og sum broytt við § 29 í anordning nr. 582 af 23. juni 2008 og § 7 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verður § 71 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 71 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 23. a.** Avgerðir tiknar av Almannaverkinum og Familjufyrisitingini kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.<br>*Stk. 2.* --- | **§ 17**<br><br>Í lov nr. 150 af 24. april 1963 om inddrivelse af underholdsbidrag, sum broytt við anordning nr. 471 af 15. september 1981, § 6 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 og § 38 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 23 a, stk. 1 orðað soleiðis:<br><br>"Avgerðir tiknar av Almannaverkinum og Familjufyrisitingini kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 51 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum, samanber tó § 21, stk. 4 og § 22, stk. 1. | **§ 18**<br><br>Í lov nr. 388 af 14. juni 1995 om værgemål, sum sett í gildi fyri Føroyar við anordning nr. 397 frá 20. april 2010, sum broytt við § 13 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017, verður § 51 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 51 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, samanber tó § 21, stk. 4 og § 22, stk. 1." |
| **§ 46 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. | **§ 19**<br><br>Í anordning nr. 37 af 22. januar 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, sum broytt við § 33 í anordning nr. 228 af 15. marts 2007, § 3 í anordning nr. 398 af 20. april 2010, anordning nr. 724 af 12. juni 2017, § 10 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 2017, verður § 46 a orðað soleiðis:<br><br>"**§ 46 a.** Avgerðir hjá Familjufyrisitingini sambært hesi lóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 30.** Familjufyrisitingarinnar afgørelser efter denne lov kan påklages til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. Dette gælder dog ikke afgørelser efter § 13, stk. 1-4.<br>*Stk 2.* Landsstýrismaðurin kan fastsætte regler om klagers behandling. | **§ 20**<br><br>Í anordning nr. 228 af 15. marts 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær, sum broytt við § 12 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 og løgtingslóg nr. 51 frá 30. apríl 2018, verður § 30, stk. 1 og 2 orðað soleiðis:<br><br>"Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg av Familjufyrisitingini, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir, tiknar sbrt. § 13, stk. 1-4. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* --- | *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um viðgerðina av kærum.” |
| **§ 41.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg av Familjufyrisitingini, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju-, og heilsumálum. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir, tiknar sbrt. §§ 10 og 11, ið kunnu leggjast fyri Føroya Rætt, sbrt. § 12.<br>*Stk. 2.* Málsviðgerðin í málum, viðgjørd sbrt. §§ 10 og 11, kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju-, og heilsumálum.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um viðgerðina av kærum. | **§ 21**<br><br>Í løgtingslóg nr. 42 frá 30. apríl 2018 um ættleiðing (Ættleiðingarlógin), sum broytt við § 76 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður § 41 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 41.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg av Familjufyrisitingini, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir, tiknar sambært §§ 10 og 11, ið kunnu leggjast fyri Føroya Rætt sambært § 12.<br>*Stk. 2.* Málsviðgerðin í málum, viðgjørd sambært §§ 10 og 11, kann kærast til Føroya Kærustovn.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um viðgerðina av kærum.” |
| **§ 10.** Um foreldur ella verji at børnum í kommunalu tannrøktini eru ónøgd við avgerð, sum Kommunustýrið tekur sambært hesi lóg, kunnu tey kæra til Almanna- og heilsumálastýrið innan 4 vikur eftir, at avgerðin er tikin.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br>*Stk. 3.* [2)] Landsstýrismaðurin í heilsumálum kann áseta, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 verður løgd til eina kærunevnd. | **§ 22**<br><br>Í løgtingslóg nr. 23 frá 6. mars 1998 um barna- og ungdómstannrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 39 frá 6. mai 2014, verður § 10 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 10.** Um foreldur ella verji at børnum í kommunalu tannrøktini eru ónøgd við avgerð, sum kommunustýrið tekur sambært hesi løgtingslóg, kunnu tey kæra til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.” |

| | |
|---|---|
| | **§ 23**<br><br>Í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 11. oktober 2011, løgtingslóg nr. 54 frá 14. mai 2013, løgtingslóg nr. 68 frá 22. mai 2015 og løgtingslóg nr. 46 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar |
| **§ 15.** Kærur, ið ikki eru um heilsufakligt virksemi, kunnu verða lagdar fyri landsstýrismannin.<br>*Stk. 2.* Kærast skal innan fýra vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Grundreglan er, at kæran skal vera skrivlig, og grundgeving skal vera fyri kæruni. | **1.** § 15 verður orðað soleiðis:<br><br>"**§ 15.** Kærur, ið ikki eru um heilsufakligt virksemi, kunnu leggjast fyri Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 16.** Landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir § 15 kann leggjast til eina kærunevnd. | **2.** § 16 verður strikað. |
| | **§ 24**<br><br>Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 170 frá 12. desember 2020, verður § 29 orðað soleiðis: |
| **§ 29.** Avgerðir tiknar av Heilsutrygd, Landsapotekaranum ella Hjálparráðsnevndini sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið boð um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum kann síggja burtur frá kærufreistini, tá serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br>*Stk. 3.* Avgerðir, tiknar av Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum, eru endaligar í fyrisitingarligum høpi. | "**§ 29.** Avgerðir tiknar av Heilsutrygd, Landsapotekaranum ella Hjálparráðsnevndini sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 7.** *(Stk. 1-2)* - - -<br>*Stk. 3.* Tryggingarfelagið, peningastovnurin, eftirlønarkassin v.m. hevur skyldu til, tá ið ein útgjalding skal fara fram av eini eftirlønarskipan, at útrokna og afturhalda avgjaldið, og innan 4 vikur aftaná, at tryggingarfelagið, peningastovnurin, eftirlønarkassin v.m. hevur fingið kunnleika um avgjaldskylduna, at inngjalda avgjaldið til landskassan. Tær í § 6 umrøddu útgjaldingar v.m. verða ikki taldar við, tá tann skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Avgjaldið kann ikki dragast frá, tá tann skattskylduga inntøkan verður uppgjørd. Útrokningin av avgjaldinum kann innan 4 vikur eftir, at boðað er frá gjaldskylduni, av tí avgjaldskylduga verða kravd eftirkannað av Toll- og Skattaráð Føroya. Kæra um avgerð hjá Toll- og Skattaráð Føroya kann leggjast fyri Skatta- og Avgjaldskærunevndina innan 4 vikur eftir, at Toll- og Skattaráð Føroya hevur tikið avgerð sína.<br>*(Stk. 4-5)* - - - | **§ 25**<br><br>Í løgtingslóg nr. 51 frá 29. desember 1971 um skatt av rentutryggingum v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2020 verður í § 7, stk. 3, 5. pkt. "Skatta- og Avgjaldskærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn" |
| **§ 3.** *(Stk. 1-4)* - - -<br>*5. stk.* Avgerðir hjá Toll- og Skattaráð Føroya eftir stk. 2 og stk. 3 kunnu innnan 4 vikur kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin. Freistin verður roknað frá tí degi, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br><br>**§ 51.** *(Stk. 1-5)* - - -<br>*6. stk.* Skattgjaldarin, tilhalds- og atvinnukommunan hava rætt til at kæra álíkningina til Skatta- og | **§ 26**<br><br>Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** § 3, stk. 5 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 5.* Avgerðir hjá Toll- og Skattaráð Føroya eftir stk. 2 og 3 kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin."<br><br>**2.** § 51, stk. 6 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 6.* Skattgjaldarin, tilhalds- og atvinnukommunan hava rætt til at kæra álíkningina til Føroya Kærustovn eftir |

| | |
|---|---|
| Avgjaldskærunevndina eftir reglunum í løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting. | reglunum í løgtingslóg um toll- og skattafyrisiting.” |
| **§ 120 n.** Har, sum tað í hesi løgtingslóg er heimilað líkningarmyndugleikunum at krevja upplýsingar í samband við skattaálíkningina, hava kommunalu skattakærunevndirnar og Skatta- og Avgjaldskærunevndin sama rætt í kæruviðgerð. | **3.** Í § 120 n verður “Skatta- og Avgjaldskærunevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”. |
| **§ 128.** Har líkningarvaldini sambært hesi lóg hava fingið rætt til at krevja upplýsingar, sum tey skulu nýta, tá skattur verður lagdur á, eiga kommunalu skattakærunevndirnar og Skatta- og Avgjaldskærunevndin sama rætt, tá hon viðger kærur. | **4.** Í § 128 verður “Skatta- og Avgjaldskærunevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”. |
| **§ 151.** Skattavaldinum, herundir eins væl líkningarvaldini sum limir í kommunalu skattakærunevndunum og landsskattakærunevndini og tey ið innheinta, er bannað, undir ábyrgd í borgarligari revsilóg fyri Føroyar, at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum teir fáa at vita um inntøku- og ognarviðurskifti, vinnuviðurskifti ella viðurskifti sum viðkoma heimlívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan teir røkja starv sítt sambært hesi lóg. Tað sama hevur gildi fyri tað hjálparfólk, sum starvar hjá skattavaldinum og annars hvønn og ein, sum hevur gjørt avtalu við tað almenna um at átaka sær eitt arbeiði og fær at vita um slík viðurskiftir. Er avtalan gjørd við eitt virki, so fevnir tagnarskyldan um øll tey í virkinum, sum fáa at vita um slík viðurskiftir.<br>*(Stk. 2-3) - - -* | **5.** Í § 151, stk. 1, 1. pkt. verður “landsskattakærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”. |
| | **§ 27**<br><br>Í løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 43 frá 26. apríl 2019, verður § 10 d orðað soleiðis: |

| | |
|---|---|
| **§ 10 d.** Avgerðir eftir hesi løgtingslóg kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina.<br>*Stk. 2.* Kæran skal verða skrivlig og styðja seg til grundir og hjáløgd próvskjøl. | "**§ 10 d.** Avgerðir eftir hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Kæran skal verða skrivlig og styðja seg til grundir og hjáløgd próvskjøl." |
| **§ 3.** *(Stk. 1) - - -*<br>*2. stk.* Í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndina, avger landsstýrið, í hvønn mun vinnurekandi virki og feløg skulu rinda avgjald av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum, tá tær bert verða framleiddar ella gjørdar til egna nýtslu hjá virkinum ella felagnum, og í hvønn mun kommunur kunnu fáa endurgoldið avgjald sambært hesi lóg av vørum og avgjaldsskyldugum tænastum.<br>*(Stk.3-5) - - -*<br><br>**§ 27.** *(Stk. 1-6) - - -*<br>*7. stk.* Í samráð við skatta- og avgjaldskærunevndina, kann landsstýrið, undir heilt serligum umstøðum loyva avgjaldsfríum innflutningi av vørum í øðrum førum enn teimum, sum nevnd eru í 3-6 stk.<br>*(Stk 8-11) - - -*<br><br>**§ 32.** *(Stk. 1-2) - - -*<br>*3. stk.* Ein avgerð sambært 2. stk. kann av einum virki leggjast fyri Skatta- og Avgjaldskærunevndina. Áheitan um at leggja fyri nevndina skal vera fráboðað Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at virkið er kunnað um ásetingina.<br>*Stk. 4. - - -* | **§ 28**<br><br>Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 4. mai 2021, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Í § 3, stk. 2 verður "skatta- og avgjaldskærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".<br><br>**2.** Í § 27, stk. 7 verður "skatta- og avgjaldskærunevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn".<br><br>**3.** § 32, stk. 3 verður orðað soleiðis:<br>"S*tk. 3.* Ein avgerð sambært stk. 2 kann av einum virki leggjast fyri Føroya Kærustovn. Áheitan um at leggja fyri Føroya Kærustovn skal vera fráboðað TAKS í seinasta lagi 4 vikur aftan á, at virkið er kunnað um ásetingina." |

| | |
|---|---|
| **V Klagureglur**<br><br>**§ 16.** Landsstýrið kann áseta reglur um møguleikan at klaga um avgerðir eftir hesi lóg.<br><br>**§ 17.** Tann nevnd, sum er sett eftir § 35 í løgtingslóg um meirvirðisgjald, hevur endaligu fyrisitingarligu avgerðina um:<br>1) Spurningar um avgjaldsskyldu.<br>2) Spurningar um avgjaldsgrundarlagið.<br>3) Klagur um ásetingar sambært meting eftir § 11, stk. 2. Umbøn um at leggja mál fyri nevndina skal verða sett fram í seinasta lagi 4 vikur aftaná, at virki er gjørt kunnugt við avgerðina. | **§ 29**<br><br>Í løgtingslóg nr. 193 frá 10. desember 1993 um lønarhæddaravgjald, sum broytt við løgtingslóg nr. 95 frá 28. desember 1998, løgtingslóg nr. 121 frá 1. desember 2003, løgtingslóg nr. 29 frá 8. apríl 2005, løgtingslóg nr. 49 frá 16. mai 2006, løgtingslóg nr. 51 frá 16. mai 2006, løgtingslóg nr. 39 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 166 frá 22. desember 2009, løgtingslóg nr. 130 frá 14. desember 2012 og § 52 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður Kapittul V Klagureglur strikaður. |
| **§ 8 a.** Avgerðir tiknar sambært hesi lóg kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskæruvevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgeving fyri kæruni skal vera við.<br>*Stk. 2.* Freistin í stk. 1 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | **§ 30**<br><br>Í løgtingslóg nr. 148 frá 30. desember 1996 um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 4. mai 2021, verður § 8 a orðað soleiðis:<br><br>“**§ 8 a.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.” |
| **§ 7.** Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu kærast til landsstýrismannin. | **§ 31**<br><br>Í løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 1997 um stuðul til ferðaútreiðslur, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 30. mars 2001, løgtingslóg nr. 48 frá 16. mai 2006, løgtingslóg nr. 109 frá 13. desember 2006, løgtingslóg nr. 41 frá 22. mai 2008, løgtingslóg nr. 125 frá 22. desember 2008, løgtingslóg nr. 121 frá 22. desember 2010 og løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2015, verður § 7 orðað soleiðis: |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 kann leggjast til eina kærunevnd. | “**§ 7.** Avgerðir, tiknar sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.” |
| **§ 7.** Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu kærast til landsstýrismannin.<br>*Stk. 2.* Kærast skal innan 4 vikur eftir at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann síggja burtur frá kærufreistini, tá ið serlig viðurskifti gera seg galdandi.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta, at heimildin hjá landsstýrismanninum eftir stk. 1 kann leggjast til eina kærunevnd. | **§ 32**<br><br>Í løgtingslóg nr. 95 frá 6. juni 1997 um stuðul til dupult húsarhald, sum broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 30. desenber 1997 og løgtingslóg nr. 150 frá 10. desember 2018, verður § 7 orðað soleiðis:<br><br>“**§ 7.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina.” |
| **§ 3.** Um TAKS heldur, at ein avgerð, sum er tikin av einari kommunalari skattakærunevnd, ikki er bein, kann TAKS við samtykki frá Toll- og Skattaráði Føroya innan 4 vikur eru lidnar frá tí, at TAKS fekk boð um avgerðina, leggja hana fyri Skatta- og Avgjaldskærunevndina. | **§ 33**<br><br>Í løgtingslóg nr. 169 frá 30. desember 1997 um Toll- og Skattafyrisiting, sum broytt við løgtingslóg nr. 147 frá 17. desember 2001, § 1 í løgtingslóg nr. 100 frá 20. desember 2002, løgtingslóg nr. 15 frá 4. mars 2005, løgtingslóg nr. 31 frá 30. apríl 2015 og løgtingslóg nr. 193 frá 21. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** § 3 verður orðað soleiðis:<br><br>“**§ 3.** Um TAKS heldur, at ein avgerð, sum er tikin av einari kommunalari skattakærunevnd, ikki er bein, kann TAKS við samtykki frá Toll- og Skattaráði Føroya innan 4 vikur eru lidnar frá tí, at TAKS fekk boð um avgerðina, leggja hana fyri Føroya Kærustovn.” |

| | |
|---|---|
| **§ 8.** *(stk.1)* ---<br>*Stk. 2.* Kæra um avgerðina hjá kommunalu skattakærunevndini ella bindandi svar eftir §§ 25c-25g verður sent Skatta- og Avgjaldskærunevndini, og skal slík kæra verða send inn í seinasta lagi 4 vikur eftir, at skattgjaldari hevur fingið boð um avgerðina. | **2.** Í § 8, stk. 2 verður "Skatta- og Avgjaldskærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni" |
| **§ 15.** (*Stk. 1-4)* ---<br>*Stk.* 5. Úrskurður skattakærunevndarinnar kann kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina innan 4 vikur eru farnar frá tí kærarin fekk kunnleika til úrskurð skattakærunevndarinnar. TAKS kann eisini kæra úrskurð skattakærunevndarinnar til Skatta- og avgjaldskærunevndina. Hetta kann tó bert gerast við samtykki frá Toll- og Skattaráð Føroya. | **3.** § 15, stk. 5 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 5.* Úrskurður skattakærunevndarinnar kann kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eru farnar frá tí, at kærarin fekk kunnleika til úrskurð skattakærunevndarinnar. TAKS kann eisini kæra úrskurð skattakærunevndarinnar til Føroya Kærustovn. Hetta kann tó bert gerast við samtykki frá Toll- og Skattaráð Føroya. |
| **§ 17.** *(Stk. 1-3)* ---<br>*Stk. 4.* [1)] Eru meira enn 3 mánaðir lidnir síðani kæran varð latin inn til skattakærunevndina, kann kæra verða latin Skatta- og avgjaldskærunevndini, sjálvt um skattakærunevndin ikki hevur gjørt sín úrskurð. | **4.** § 17, stk. 4 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 4.* Eru meira enn 3 mánaðir lidnir síðani kæran varð latin inn til skattakærunevndina, kann kæra verða latin Føroya Kærustovni, sjálvt um skattakærunevndin ikki hevur gjørt sín úrskurð."<br><br>**5.** § 21 verður orðað soleiðis: |
| **§ 21.** Øll tey, sum Toll- og Skattaráðið hevur sett í skatt, broytt skattaálíkningina hjá, álagt toll- og avgjald ella givið bindandi svar eftir §§ 25c-25g, kunnu kæra avgerðirnar til Skatta- og avgjaldskærunevndina. Slíkar kærur skulu verða sendar skrivliga innan 4 vikur eftir tað, at tey hava fingið boð um avgerð Toll- og skattaráðsins. | "**§ 21.** Øll tey, sum Toll- og Skattaráðið hevur sett í skatt, broytt skattaálíkningina hjá, álagt toll- og avgjald ella givið bindandi svar eftir §§ 25 c-25 g, kunnu kæra avgerðirnar til Føroya Kærustovn. Slíkar kærur skulu verða sendar skrivliga innan 4 vikur eftir tað, at tey hava fingið boð um avgerð Toll- og skattaráðsins." |
| **Kap. 5**<br>**Skatta- og avgjaldskærunevndin**<br><br>**§ 22.** Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger toll- og skatta- og avgjaldskærur. | **6.** Kapittul 5 verður orðaður soleiðis:<br><br>**"Kapittul 5**<br>**Kæra til Føroya Kærustovn** |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Í Skatta- og avgjaldskærunevndini eru 5 av landsstýrismanninum tilnevndir limir. 2 av limunum skulu vera lógakønir, 1 skal vera roknskaparkønur, 1 skal umboða arbeiðsgevarafeløgini og 1 verkamannafeløgini. Landsstýrismaðurin tilnevnir umboðini fyri arbeiðsgevarafeløgini og verkamannafeløgini eftir tilmæli frá feløgunum.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í skattamálum tilnevnir formannin og næstformannin, sum skulu verða lóg- ella roknskaparkønir. Á sama hátt tilnevnir landsstýrismaðurin 5 varalimir. Starvstíð nevndarinnar og varalimanna er 4 ár.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin í skattamálum skipar fyri, at nevndin fær neyðuga skrivarahjálp og avger, um fastur skrivari skal setast í starv, ella um skrivaraarbeiði skal liggja hjá einum almennum kærustovni.<br>*Stk. 5.* Til tess at veita Skatta- og avgjaldskærunevndini hjálp, tá biðið verður um tað viðvíkjandi serliga fløktum og truplum málum, kann landsstýrismaðurin í skattamálum eisini skipa fyri serkønari hjálp. Hjálparmenn fáa løn, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetir.<br>*Stk. 6.* Limirnir fáa løn ella samsýning, sum landsstýrismaðurin í skattamálum ásetur.<br>*Stk. 7.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð reglur um starvsskipan og freistir í sambandi við kæruviðgerð hjá Skatta- og Avgjaldskærunevndini. | **§ 22.** Føroya Kærustovnur viðger tollkærur, skattakærur og avgjaldskærur. |
| **§ 23.** Somu reglur, um hvør kann taka lut í kæruviðgerð sambært § 13, stk. 3 er eisini galdandi fyri limir í Skatta- og avgjaldskærunevndini. | **§ 23.** Somu reglur, um hvør kann taka lut í kæruviðgerð sambært § 13, stk. 3 eru eisini galdandi fyri serkønar ráðgevar í tollkærum, skattakærum og avgjaldskærum hjá Føroya Kærustovni. |
| **§ 24.** Skatta- og avgjaldskærunevndin ger úrskurð um kærur um tær avgerðir, TAKS, kommunalu skattakærunevndirnar, ella Toll- og skattaráðið hava tikið.<br>*Stk. 2.* Kærandi kann sjálvur senda inn kæruna. Kæra um skattseting kann ikki skjótast inn fyri Skatta- og avgjaldskærunevndina, um kærandi ikki í rættari tíð hevur sent kæru til kommunalu | **§ 24.** Føroya Kærustovnur ger úrskurð um kærur um tær avgerðir, TAKS, kommunalu skattakærunevndirnar, ella Toll- og skattaráðið hava tikið.<br>*Stk. 2.* Kærandi kann sjálvur senda inn kæruna. Kæra um skattseting kann ikki |

| | |
|---|---|
| skattakærunevndina. Hetta er tó ikki galdandi, um kærandi heldur fast um, at hann ikki er skattskyldugur, ella tað eru gjørd slík formlig mistøk, tá hann varð settur í skatt, at tey kunnu ógilda skattsetingina. Kæra skal vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina.<br>*Stk. 3*. Er kæra ov seint inn latin, ella eru treytirnar fyri at gera úrskurð um hana eftir tí, ið framman fyri er ásett, annars ikki til, verður hon ikki viðgjørd. Tó er Skatta- og avgjaldskærunevndini heimilað at taka kærur til viðgerðar í teimum førum, ið nevnd eru í stk. 2, og tá hon heldur fullgóð forføll vera, tó at tær vanligu treytir fyri hesum eru ikki uppfyltar.<br>*Stk. 4*. (Strikað).<br><br>**§ 25.** Kæra til Skatta- og avgjaldskærunevndina skal verða send skrivliga og styðja seg til grundir og hjáløgd próvskjøl. Tá hin kærandi biður um tað, skal hann ella umboðsmaður hansara sleppa at siga fram sína áskoðan munnliga fyri nevndini. Tá so er, skal TAKS hava fráboðan og hava rætt til eisini at verða umboðað á fundinum.<br>*Stk. 2.* Nevndin leitar sær ummæli frá TAKS um ta innkomnu kæruna. Áðrenn TAKS ger hetta, fær tað til vega upplýsingar, ið tørva til at gera úrskurð í málinum. Nevndin kann biðja TAKS lata seg umboða, tá nevndin hevur kærumál til viðgerðar.<br>*Stk. 3*. Í teimum førum, tá ið beinleiðis er ætlað um inntøku skattgjaldara, stendur tann meting við, ið TAKS ella Toll- og Skattaráðið, hevur gjørt uttan so, at hann, ið kærir, kemur við tílíkum upplýsingum og prógvum afturat, at Skatta- og avgjaldskærunevndin av tí verður før fyri sjálv at ætla um málið.<br>*Stk. 4*. Skatta- og avgjaldskærunevndin, sum ger úrskurð um tær innkomnu kærurnar, kann taka alla avgerðina, sum hon er, upp til viðgerðar, sama hvat kæruevnið er. | skjótast inn fyri Føroya Kærustovn, um kærandi ikki í rættari tíð hevur sent kæru til kommunalu skattakærunevndina. Hetta er tó ikki galdandi, um kærandi heldur fast um, at hann ikki er skattskyldugur, ella tað eru gjørd slík formlig mistøk, tá hann varð settur í skatt, at tey kunnu ógilda skattsetingina. Kæra skal vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina.<br>*Stk. 3*. Er kæra ov seint inn latin, ella eru treytirnar fyri at gera úrskurð um hana eftir tí, ið framman fyri er ásett, annars ikki til, verður hon ikki viðgjørd. Tó kann Føroya Kærustovnur taka kærur til viðgerðar í teimum førum, ið nevnd eru í stk. 2, og tá tað verður metta at fullgóð forføll eru, tó at tær vanligu treytir fyri hesum eru ikki uppfyltar.<br><br>**§ 25.** Kæra til Føroya Kærustovn skal verða send skrivliga og styðja seg til grundir og hjáløgd próvskjøl. Tá hin kærandi biður um tað, skal hann ella umboðsmaður hansara sleppa at siga fram sína áskoðan munnliga fyri Føroya Kærustovni. Tá so er, skal TAKS hava fráboðan og hava rætt til eisini at verða umboðað á fundinum.<br>*Stk. 2.* Føroya Kærustovnur leitar sær ummæli frá TAKS um ta innkomnu kæruna. Áðrenn TAKS ger hetta, fær tað til vega upplýsingar, ið tørva til at gera úrskurð í málinum. Føroya Kærustovnur kann biðja TAKS lata seg umboða, tá Føroya Kærustovnur hevur kærumál til viðgerðar.<br>*Stk. 3*. Í teimum førum, tá ið beinleiðis er ætlað um inntøku skattgjaldara, stendur tann meting við, ið TAKS ella Toll- og Skattaráðið, hevur gjørt uttan so, at hann, ið kærir, kemur við tílíkum upplýsingum og prógvum afturat, at Føroya Kærustovnur av tí verður førur fyri sjálvur at ætla um málið.<br>*Stk. 4*. Føroya Kærustovnur, sum ger úrskurð um tær innkomnu kærurnar, kann taka alla avgerðina, sum hon er, |

| | |
|---|---|
| *Stk. 5*. Úrskurður Skatta- og avgjaldskærunevndarinnar kann skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 3 mánaðir eru farnir. | upp til viðgerðar, sama hvat kæruevnið er.<br>*Stk. 5*. Úrskurður hjá Føroya Kærustovni kann skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 3 mánaðir eru farnir." |
| **§ 14.** Avgerðir eftir hesi løgtingslóg verða tiknar av TAKS. Avgerðirnar kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin. | **§ 34**<br><br>Í løgtingslóg nr. 171 frá 30 desember 1997 um skattafría samanlegging o.a., sum broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 8. apríl 1998, løgtingslóg nr. 172 frá 21. desember 2001, løgtingslóg nr. 120 frá 1. desember 2003, løgtingslóg nr. 77 frá 22. mai 2015 og løgtingslóg nr. 188 frá 21. desember 2018, verður § 14, 2. pkt. orðað soleiðis:<br>"Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 3.** *(Stk. 1)* - - -<br>*Stk. 2.* Hevur skattavaldið gjørt eina álíkning, kann tað sjálvboðið ella eftir áheitan frá tí skattskylduga taka hana upp til nýggja viðgerð og broyta hana. Skattavaldið kann tó ikki broyta eina álíkning, sum Skatta- og Avgjaldskærunevndin hevur gjørt úrskurð um. Áðrenn skattavaldið broytir eina álíkning, skal tann skattskyldugi hava høvi til skrivliga ella munnliga at geva til kennar áskoðan sína. Tann skattskyldugi skal hava skrivliga og grundgivna fráboðan um slíkar broytingar saman við kæruvegleiðing. | **§ 35**<br><br>Í løgtingslóg nr. 16 frá 14. februar 2000 um álíkning, innkrevjing, eftirlit o.a. í sambandi við skatting av inntøku av kolvetnisvirksemi (Kolvetnisskattafyrisitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 100 frá 20. desember 2002, verður í § 3, stk. 2, 2. pkt. "Skatta- og Avgjaldskærunevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur". |
| **§ 20**. *(Stk. 1)* ---<br>*Stk. 2.* Avgerðir tiknar eftir hesi løgtingslóg kunnu innan 4 vikur kærast til | **§ 36**<br><br>Í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 um skatting av kapitalvinningi (Kapitalvinningsskattalógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 4. mai 2021, verða § 20, stk. 2 og 3 strikað, og í staðin verður sett: |

| | |
|---|---|
| Skatta- og avgjaldskærunevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin.<br>*Stk. 3*. Freistin í stk. 1 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | "*Stk. 2.* Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin." |
| **§ 33.** Avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.<br>*Stk. 2.* Freistin í stk. 1 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | **§ 37**<br><br>Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18. mai 2015, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2015, løgtingslóg nr. 155 frá 12. desember 2018, løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019, løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 100 frá 25. juni 2020 og løgtingslóg nr. 18 frá 24. februar 2021, verður § 33 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 33.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| **§ 16 b.** Avgerðir, tiknar sambært hesi løgtingslóg, kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.<br>*Stk. 2.* Freistin verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | **§ 38**<br><br>Í løgtingslóg nr. 49 frá 14. mai 2013 um eftirløn (Eftirlønarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 133 frá 19. desember 2014, § 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 44 frá 6. mai 2015, løgtingslóg nr. 157 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 69 frá 30. apríl 2018, § 1 í løgtingslóg nr. 78 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 35 frá 26. mars 2021, verður § 16 b orðað soleiðis:<br><br>"**§ 16 b.** Avgerðir, tiknar sambært hesi løgtingslóg, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| | **§ 39** |
| | Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015 og løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018, verður § 4 orðað soleiðis: |
| **§ 4.** Avgerðir, tiknar sbrt. hesi løgtingslóg, kunnu innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina.<br>*Stk. 2.* Freistin verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | "**§ 4.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |
| | **§ 40** |
| | Í løgtingslóg nr. 105 frá 29. juni 2020 um skatting av vinningi frá sølu av veiðirættindum verður gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 7.** Avgerð eftir hesi løgtingslóg verður tikin av TAKS.<br>*Stk. 2.* Avgerðin kann innan 4 vikur kærast til Skatta- og avgjaldskærunevndina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin.<br>*Stk. 3.* Freistin í stk. 2 verður roknað frá tí degi, kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. | **1.** § 7, stk. 2 verður orðað soleiðis:<br>"*Stk. 2.* Avgerðin kann kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin."<br><br>**2.** § 7, stk. 3 verður strikað. |
| | **§ 41** |
| **§ 24.** Allar avgerðir, tiknar av Studna, kunnu kærast til Kærunevndina hjá Studna, innan 6 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Avgerð kærunevndarinnar er endalig innan fyrisitingina.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin setir kærunevnd við 3 limum og 3 varalimum. Formaðurin skal vera løgfrøðingur.<br>*Stk. 3.* Limirnir verða settir fyri 4 ár í senn. Landsstýrismaðurin kann áseta reglur fyri kærunevndina. | Í løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 44 frá 22. apríl 2021, verður § 24 orðað soleiðis:<br><br>"**§ 24.** Allar avgerðir, tiknar av Studna, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 6 vikur eftir, at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina." |

| | |
|---|---|
| **§ 26.** Grannskoðarar, sum nevnt í § 1, stk. 1, nr. 5, eru undantiknir skylduni í § 25 at fráboða við støði í upplýsingum, sum hesir hava fingið frá ella heintað inn um eitt viðskiftafólk, tá teir umboða eitt viðskiftafólk í Skatta- og avgjaldskærunevndini. Undantakið í 1. pkt. er galdandi uttan mun til, um upplýsingarnar eru fingnar áðrenn, undir ella aftaná málið í Skatta- og avgjaldskærunevndini.<br>*(Stk. 2-3)* - - - | **§ 42**<br><br>Í løgtingslóg nr. 190 frá 18. desember 2020 um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin) verða gjørdar hesar broytingar:<br><br>**1.** Í § 26, stk. 1, 1. pkt. verður "Skatta- og avgjaldskærunevndini" broytt til: "skattamáli, avgjaldsmáli ella tollmáli í Føroya Kærustovni"<br><br>**2.** Í § 26, stk. 1, 2. pkt. verður "Skatta- og avgjaldskærunevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni" |
| | **§ 43**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022. Samstundis fer løgtingslóg nr. 47 frá 23. mars 1993 um kærunevnd í almanna-, familju- og heilsumálum úr gildi. |